F R Í G G J A D A G U R 8 . d e s e m b e r 2 0 0 6

Sosialurin

# VARPIÐ



TV3
Leygardagin kl. 18.00

## 102 dalmatinere

**Eftir at hava gingið hjá terapetui kemur Cruella De Vil úr geglinum sum ein nýggj kvinna. Hon elskar nú hundar, og tí er hon ovurfegin um, at Chloe, sum skal ansa eftir henni, heuvr eina dalmatinarafamilju og góð sambond til eitt hundafelag. Ljóðið av Big Ben But kann tó koppa allar sálarjavnvág, og tí er tað bert ein spurningur um tíð, áðrenn Cruella aftur er, sum hon áður plagdi at vera.**



DR2 Sunnudagin kl. 15.00

**Love Story**

Ryan O'Neal og Ali MacGaw hava leiklutirnar sum Oliver og Jenny í Love Story. Klassiska filminum frá 70'unum, sum telist millum størstu romantisku upplivingarnar á løriftinum nakrantíð. Filmurin varð nomineraður til ikki færri enn sjey Oscar-virðislønir, og gjørdist samstundis gjøgnumbrotið hjá teimum báðu ungu stjørnunum.



3+ Leygardagin kl. 22.20

**Swept away**

Madonna hevur høvuðsleiklutin, nú klassiski italski skemtifilmurin er endurinnspældur. Hon hevur leiklutin sum ein rík og sjálvnøgd kvinna, sum er von við at fáa alt júst so, sum hon vil hava tað. Alt ehtta broytist, tá hon endar á eini oydnari oyggj saman við einum manni, sum starvast hjá henni. Innan leingi eru leiklutirnir viðvendir, og nú er tað brádliga ríka frúan, sum er við undirlutan.



Canal+Film1 Leygardagin kl. 19.00

**Wedding Crashers**

Vinirnir og starvsfelagarnir John Beckwith og Jeremy Grey hava eitt felags áhugamál. At fáa brúdleyp at crasha. Lívið er ein veitsla, alt sum tað er, men ein dagin hittir John Claire.

**Filmir í hópatali • …nasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi al… sam…ið**